Ognarfelagið mist tolið

Felagið, ið umboðar allar tryggingartakarar í LÍV, hevur mist tolið við Vinnumálaráðnum og vil hava løgmann at taka um endan. Ognarfelagið LÍV trýr ikki uppá, at fakfeløgini klára at lofta helvtini av LÍV



LÍV gleppur fakfeløgum av hondu

Fakfeløgini fáa neyvan loyvi at keypa helvtina av Føroya Lívstrygging, hóast Vinnumálaráðið trýstir á tyri at fáa søluna framda. Tryggingareftirlitið kann ikki góðkenna fakfeløgini sum keyparar, tí tey eru ov veik at lofta eftirlønarmilliardunum. Á síðulinjuni bíðar TF Holding við einum ítøkiligum tilboði

Jón Brian Hvidtfeldt

Tað sá so einfalt út, tá 17 fakfeløg hálvan desember í fjør boðaðu frá, at tey nú keypa helvtina av Føroya Lívstrygging.

Keypssáttmáli varð undirskrivaður friggjadagin 14. desember, og við honum keyptu fakfeløgini helvtina av LÍV fyri 35 milliónir krónur. Hin helvtin skal, sambært lóg, latast Ognarfelagnum LÍV.

Síðani hevur tøgn verið um keypið, ið sambært almennu fráboðanini í desember "er treytað av, at Tryggingareftirlitið og avvarðandi myndugleikar góðkenna tað."

Alment vil Tryggingareftirlitið einki siga um málið yvirhøvur, nú farið er um hálvan apríl. Men Sosialurin veit frá keldum, at Tryggingareftirlitið í drúgvari frágreiðing ger greitt, at søluna kann ikki góðkennast.

Sambært keldum hjá Sosialinum reisir Tryggingareftirlitið eina rað av spurningum, ið sáa iva um, hvørt fakfeløgini megna at lofta helvtini av einum felag, sum umsitur eftirlønir fyri milliardir av krónum.

Sum myndugleiki skal Tryggingareftirlitið meta um styrkina hjá tí felag, ið keypir. Eisini skal eftirlitið meta um útlitini fyri, at hesi megna at reka LÍV á skilagóðan hátt. Og tað er henda meting, ið sambært keldunum hjá Sosialinum, ikki ber á mál.

Politikkurin

Eftir togan og telvan í áravis bleiv í 2006 politisk semja um at einskilja Føroya Lívstrygging. Leisturin bleiv, at helvtin av partabrøvunum skuldu latast Ognarfelagnum LÍV, sum er felagið hjá øllum tryggingartakarum í LÍV, meðan hin helvtin skuldi seljast. Í leistinum, sum eitt samt løgting tók undir við í mai 2006, lá eisini, at landsstýrið skuldi avhenda báðar helvtirnar av LÍV í senn. Á henda hátt kundi landsstýrið stýra og tryggja, at Ognarfelagið LÍV og ein komandi keypari fingu í lag eina skilagóða samstarvsavtalu um framtíðar rakstur av Føroya Lívstrygging.

BankNordik ætti besta tilboðið, og í mai í 2011 boðaði bankin frá, at tey vildu keypa helvtina av LÍV fyri 35 milliónir krónur. Taparin í tí kappingini var TF Holding, ið eisini bjóðaði.

Men tilboðið hjá BankNordik varð sum kunnugt trekt aftur í mars í fjør, og líka síðani hava fakfeløgini ligið framvið at keypa. Í mai í fjør settu fakfeløgini ein bólk við fimm fakfelagsformonnum og –kvinnum at standa fyri keypinum vegna fakfeløgini, ið tá avtornaði gjørdust 17 í tali.

Meðan TF Holding framvegis visti áhuga, so var tíðliga í tilgongdini greitt, at Vinnumálaráðið heldur vildi hava fakfeløgini at keypa LÍV. Enntá gav landsstýrismaðurin í fjørsummar greitt til kennar, at hann um neyðugt ætlaði at selja helvtina av LÍV til fakfeløgini, uttan samstundis at lata hina helvtina til Ognarfelagið LÍV. Boðini frá Johan Dahl til fakfelagsbólkin vórðu givin í juni í fjør.

Ein fortreyt fyri søluni av helvtini av LÍV var sum longu nevnt, at hin helvtin av felagnum samstundis verð avhendað til Ognarfelagið LÍV, sum í sínum lagi var farið at ótolnast eftir at fáa sína helvt av felagnum. Í september í fjør hevði Ognarfelagið LÍV mist tolið, og bað til landsstýrismannin í vinnumálum um at taka av ti tilboði, sum TH Holding hevði uppá helvtina av LÍV. Ognarfelagið visti millum annað á, at TF Holding stóð við sítt tilboð, og at tað hevði TF Holding eisini gjørt Vinnumálaráðnum greitt í juni í fjør.

Sambært keldum hjá Sosialinum var Ognarfelagið LÍV longu tá, í fjørheyst, sannført um, at framtíðin var mest fruktargóð saman við TF Holding, heldur enn saman við fakfelagsbólkinum. Komið var so langt við hesum friggjarii, at Ognarfelagið LÍV og TF Holding høvdu gjørt eina sinamillum avtalu um, hvussu LÍV skuldi skipast og umskipast eftir eina møguliga sølu.

Leggjast kann afturat, at telvingin um søluna av LÍV fer fram, samstundis sum landsstýrið broytir viðurskiftini á eftirlønarmarknaðinum grundleggjandi. 1. januar 2012 kom í gildi lógin, ið skattar eftirlønir við inngjald, heldur enn útgjald. Og samstundis varð við eini skiftistíð uppá hálvt ár kravt, at í framtíðini skulu allar eftirlønir sparast upp í Føroyum.

Tilboðið vigast

Tað var sum nevnt hálvan desember í fjør, at fakfeløgini skrivaðu undir keypssáttmála fyri helvtina av LÍV. Formliga er tað smápartafelagið Fakfelag, við 80.000 krónum í partapeningi, ið keypir. Nevndarformaður er Pætur Niclasen, formaður í S&K Felagnum, meðan Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum, er stjóri í sp/f Fakfelag, ið er stovnað hálvan oktober í fjør.

Tryggingareftirlitið skal, sum tað liggur í orðinum, hava eftirlit við teimum, sum reka tryggingarvirksemi í Føroyum, bæði tryggingarfelagum og eftirlønargrunnum. Tryggingareftirlitið skal somuleiðis góðkenna tey, sum ætla at keypa seg inn í hesa vinnu. Eitt nú, um ein partaeigari yvirhøvur er egnaður at vera partaeigari í hesi vinnu, sum livir av at umsita pengar hjá fólki, líka til tey fáa brúk fyri teimum við pensjónsaldur.

Tað ber ikki til at fáa útgreinað niðurstøðuna hjá Tryggingareftirlitinum um ikki at góðkenna sp/f Fakfelag sum ein serligsan keypara av helvtini av LÍV.

- Eg havi onga viðmerking yvirhøvur, er tað einasta, ið Jógvan Thomsen, stjóri á Tryggingareftirlitinum, fæst at siga.

Jógvan Thomsen vil heldur ikki siga, nær ein almenn fráboðan kemur frá Tryggingareftirlitinum. Hann hevur onga viðmerking til málið.

Fakfeløgini hava higartil einki vilja sagt um, hvussu tey ætla at liggja eitt komandi keyp av helvtini av Føroya Lívstrygging, ið teimum stendur í boði fyri 35 milliónir krónur. Keldur hjá Sosialinum vilja tó vera við, at keypið partvis skal figgjast við lántøku, ið skal rindast aftur við framtíðar vinningsbýti úr LÍV.

Alt á gólvið

Niðurstøðan hjá Tryggingareftirlitinum hevur sett ferð á fundarvirksemið kring søluna av Føroya Lívstrygging.

Sum Sosialurin skilir royna fakfeløgini at savna og styrkja seg um eina nýggja roynd at sleppa gjøgnum nálareygað hjá eftirlitinum.

Á hinum bógnum hevur Ognarfelagið LÍV, ið sambært løgtingslóg frá 2006 skal fáa helvtina av LÍV, endaliga mist tolið við fakfeløgini. Ognarfelagið LÍV hevur gjørt Vinnumálaráðnum greitt, at tey tíma ikki at spæla við meira. Ognarfelagið metir søluna til sp/f Fakfelag at vera dotna niðurfyri, og felagið sigur seg ikki hava hug at leingja freistirnar, soleiðis at fakfeløgini fáa ein kjans afturat. Í staðin mælti Ognarfelagið LÍV enn einaferð til, at TH Holding sleppur at keypa helvtina av LÍV.

Brævið til Vinnumálaráðið varð sent tíðliga í apríl, við avriti til løgmann. Ognarfelagið LÍV bað tá um fund við landsstýrismannin í vinnumálum, men higartil er eingin fundur komin í lag.

Í brævinum til Vinnumálaráðið fyrst í apríl metir Ognarfelagið LÍV støðuna so álvarsama, at komið er til eitt markamót.

– Avgerðirnar komandi vikurnar gera av, um LÍV hórar undan sum felag, ella bløðir út, skrivaði Ognarfelagið í brævinum til Vinnumálaráðið.

Nú er Ognarfelagið LÍV sum nevnt farið eitt stig víðari, og heitir beinleiðis á løgmann um at taka um endan.

TF Holding bjóðar

- Ja, vit eru áhugað at keypa helvtina av LÍV. Tað staðfestir Regin Hammer, sum sigur seg kunna bjóða eina loysn, ið er góð fyri allar partar. TF Holding hevur í vikuni gjørt Vinnumálaráðnum greitt, at teirra tilboð um at keypa helvtina av Føroya Lívstrygging stendur við

Jón Brian Hvidtfeldt

- Vit hava sagt tað áður, og vit siga framvegis, at vit eru áhugað at keypa. Tað sigur Regin Hammer, forstjóri í TF Holding.

Higartil hevur TF Holding fingið krakk, ikki minni enn tvær ferðir. Fyrst tapti tað kappingina við Nordik, og síðani varð sett út á síðulinjuna.

Í hesi vikuni hevur hann ti enn einaferð gjørt Vinnumálaráðnum greitt, at TF Holding er sinnað at keypa.

Í TF Holding samtakinum er longu fyritaksjónsgrunnar og møguligar pensjónskassar.

- Lívstryggingarøkið er eitt av teimum økjum, har Føroyar eru ov lítlar til fleiri veitarar, sigur Regin Hammer og heldur fram:

- Uttanlanda verður sagt, at helst skulu fleiri milliónír fólk vera fyri hvørt lívstryggingarfelag fyri at umsitingargjaldið skal vera nøktandi. Ti gevur tað onga meining at býta føroyska marknaðin í tvey. Prísásetingin er hartil sera tengd at lógarkrøvum, sigur Regin Hammer.

Hann visir á, at alternativt verða í mesta lagi tvey felog, sum í framtíðini koma at bjóða fram hesar tænastur.

- Og tað dýrkar umsitingina, sigur Regin Hammer.

Tilboðið

Upprunaliga bjóðaði TF milliónír krónur í LÍV.

Modellið

- Vit halda okkum kunna bjóða eitt modell, ið gagnar øllum partum. Eisini felagunum, sigur Regin Hammer.

Hansara modell byggir í stuttum á at hugsa um lívstryggingar og pensjónir hvør sær, og skipa eitt nýtt LÍV, sum skal hava eina felags umsiting av øllum lívstryggingum í Føroyum. Forstjórin í TF Holding sær eisini fyri sær, at nýggja felags lívstryggingarfelagið bjóðar tænastur til allar

tvey ár síðani, at vit bjóðaðu fyrstuferð, og nógv er broytt síðani tá, sigur Regin Hammer og sipar til broyttu skattareglurnar og kravið um at pensjónir skulu sparast upp í Føroyum.

- Tí mugu vit sjálvandi hyggja fyritøkuna igjøgnum aftur, um tað gerst aktuelt. Men sum útgangsstøði stendur tilboðið við, sigur Regin Hammer.

Forstjórin í TF Holding sigur seg ikki duga at meta um møguleikarnar fyri játtandi svari úr Vinnumálaráðnum, ei heldur um nakað svar kemur.

- Nei, tað geri eg ikki. Vit virða sjálvandi, at Vinnumálaráðið er í dialogi við ein triðjapart, men hinvegin, um vit ikki vera partur av slíkari loysn, so eru vit gjøgnum Betri pensjón altíð klár at taka kappingin

Johan Dahl trumfar

Hálvan juni í fjør gav landsstýrismaðurin í vinnumálum fakfelagsbólkinum skrivliga tilsøgn um, at tey skuldu sleppa at keypa helvtina av LÍV. Um neyðugt, so skuldi Ognarfelagið LÍV haldast uttanfyri, lovaði Johan Dahl

Jón Brian Hvidtfeldt

Tað var rímuliga tíðliga í tilgongdini, at tað kólnaði millum Ognarfelagið LÍV og fakfelagsbólkin, ið skuldi keypa helvtina av LÍV, eftir at BankNordik í mars í fjør trekti sítt tilboð aftur.

Tað alt annað líka óhepplið, tí sjálv grundhugsanin í løgtingslóg nummar 59 frá 2006 er, at helvtin av partabrøvunum í Føroya Lívstrygging skal avhendast Ognarfelagnum LÍV, og hin helvtin av partabrøvunum skal seljast. Við hvør sinum 50 prosentum av atkvøðunum er tað ein fortreyt, at báðir aktørar kunnu arbeiða saman. Tí skal landsstýrið ikki avhenda sín

teir báðar partar, sum yvirtaka hvør sína helvt.

Ein komandi søla og avhending av partabrøvunum í LÍV skal rótfestast í figgjarlógini, og síðstu árini hevur landsstýrið tí á hvørjum ári havt LÍV standandi undir grein-56 í figgjarlógini, sum eru serinntøkur.

Í figgjarlógini fyri 2013 stendur millum annað, at

- Í góðari samvinnu við Ognarfelagið LÍv er nágreiniligur koyriplanur lagdur, ið skal tryggja, at Ognarfelagið Liv fær sína helvt av partapeningínum í P/F Føroya Lívstrygging, samstundis sum hin helvtin verður endaliga avhendað keypara."

Trýstið

skulu eiga og reka LÍV í framtíðini, fer landsstýrismaðurin í vinnumálum í offensivin.

Hálvan juni í fjør ger Johan Dahl fakfelagsbólkinum greitt, at hann ætlar at selja teimum helvtina av LÍV, um ein nøktandi avtala annars fæst í lag. Fyri at undirstrika týdningin av sínum boðskapi skrivar Johan Dahl viðari, at "fæst ikki semja millum fakfelagsbólkin og Ognarfelagið, kann eg selja til fakfelagsbólkin, uttan samstundis at lata hini so prosentini til Ognarfelagið."

Tað vísa skjøl, sum Sosialurin hevur fingið fatur á.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum fer enntá eitt stig viðari og útgreinar sína ætlan. Johan Dahl tann støðan, ætlí eg at gera partaeigarasavtalu við fakfelagsbólkin. Ognarfelagið hevur so møguleika eftirfylgjandi at yvirtaka sín part av partapeningínum og innganga í partaeigarasavtaluna, sum er gjørd millum fakfelagsbólkin og VMR, og kann møguliga við samráðingum við fakfelagsbólkin gera broytingar í partaeigaraavtaluni."

Hervið leggur landsstýrismaðurin upp til at bróta við grundhugsanina í einskiljingarætlanini av LÍV, sum sigur at helvtin av partabrøvunum skal avhendast og hin søljast – og bæði skulu gerast í senn.

Tann ætlanin bleiv sum kunnugt ongantíð gjøgnumført. Men tilsøgnin er undirskrivað av landsstýris-

Fakfeløg vóna framvegis

- Ja, tað er rætt, at Tryggingareftirlitið krevu fleiri upplýsingar og útgreiningar. Men hesar klóra vit at útvega, og fara at senda nýggja umbøn til eftirlitið, sigur Pætur Niclasen, nevndarformaður í sp/f Fakfelag

- Vit hava framvegis vónir um, at tað fer at eydnast okkum at keypa helvtina av LÍV. Men tað fer at taka longri tíð enn ætlað, helst einar 4-8 vikur, sigur Pætur Niclasen.

Sambært nevndarformanninum í sp/f Fakfelag vil Tryggingareftirlitið hava fleiri upplýsingar, til dømis hvør skal sita í nevndini í tí felag, sum eftir ætlan skal keypa. Eisini vil eftirlitið hava felagið broytt frá smápartafelag til partafelag. Og so vil Tryggingareftirlitið eisini hava útgreinað, hvussu keypið skal figgjast.

- Vit eru eitt sindur klokk av frágreiðingini hjá Tryggingareftirlitinum, sigur Pætur Niclasen.

Sambært Pæturi Niclasen er ætlanin, at fakfeløgini sjálvi útvega 13-14 milliónir krónur

roknistykkinum, hvussu k skal figgjast, er innroknað vinningsbýti, ið felagini hava úr LÍV næstu árini. váttar hann, at tað er lí roknistykkið, ið Tryggi eftirlitið enn ikki hev kent. Tilboðið frá fak um er 35 milliónir k

Pætur Niclasen roknskapurin fyri ikki endaliga liðu seinkar arbeiðin

- Men hann v áðrenn aðalfun sigur hann.

Høsat Ogn hevur boðað V num frá, at t til sp/f Fakfe na niðurfyri, Niclasen ei

- Nei, t skilli

Sosialurin kundi fríggjadagin avdúka, at fakfeløgini sleppa ikki at keypa helvtina av Føroya Lívstrygging. Tryggingareftirlitið. Tryggingareftirlitið kann ikki góðkenna fakfeløgini sum keyparar, tí tey eru ov veik at lofta eftirlønarmilliardunum. Á síðulinjuni bíðar TF Holding við einum ítøkiligum tilboð. Ognarfelagið LÍV, sum sambært lóg skal fáa hina helvtina av LÍV, hevur mist tolið við fakfeløgini og biður landsstýrið um at selja hina helvtina til TF Holding.

Jón Brian Hvidtfeldt

Løgmaður verður nú drigin inn í málið um einskiljingina av LÍV. Kaj Leo Holm Johannesen fær í dag eitt bræv frá Ognarfelagnum LÍV, har løgmaður snøgt sagt verður biðin um at taka um endan á hesum drúgva máli.

Tað váttar Jógvan Mørkøre, formaður í Ognarfelagnum LÍV. Jógvan Mørkøre vil tó ikki siga, hvat stendur í brævinum til løgmann, tí móttakarin skal hava møguleika at lesa tað fyrst. Fleiri viðmerkingar hevur hann ikki í løtuni.

Orsøkin til stigið er, sum Sosialurin skilir, at Tryggingareftirlitið kann ikki góðkenna fakfeløgini sum keyparar av helvtini av LÍV. Við Sosialin fríggjadagin segði Pætur Niclasen, nevndarformaður í sp/f Fakfelag, at fakfeløgini framvegis ætla at keypa, hóast Tryggingareftirlitið enn ikki kann góðkenna tey sum keyparar.

– Vit hava framvegis vónir um, at tað fer at eydnast okkum at keypa helvtina av LÍV. Men tað fer at taka longri tíð enn ætlað, helst einar 4-8 vikur, sigur Pætur Niclasen.

Men Ognarfelagið LÍV, sum sambært lóg skal fáa avhendað hina helvtina av LÍV, hevur sum nevnt mist trúnna á, at slíkar loysnir kunnu finnast.

Á politiskt borð

Fyrr í hesum mánaðinum sendi Ognarfelagið LÍV bræv til Vinnumálaráðið, har gjørt varð greitt, at tey tíma ikki at spæla við meira.

Í brævinum til Vinnumálaráðið gjørdi Ognarfelagið greitt, at tey meta søluna til sp/f Fakfelag at vera dotna niðurfyri, og felagið sigur seg ikki hava hug at leingja freistirnar, soleiðis at fakfeløgini fáa ein kjans afturat. Í staðin mælti Ognarfelagið LÍV enn einaferð til, at TH Holding sleppur at keypa helvtina av LÍV.

Brævið til Vinnumálaráðið varð sent tíðliga í apríl, við avriti til løgmann. Ognarfelagið LÍV bað tá um fund við landsstýrismannin í vinnumálum, men higartil er eingin fundur komin í lag.

Í brævinum til Vinnumálaráðið fyrst í apríl metir Ognarfelagið LÍV støðuna so álvarsama, at komið er til eitt markamót.

– Avgerðirnar komandi vikurnar gera av, um LÍV hórar undan sum felag, ella bløðir út, skrivaði Ognarfelagið í brævinum til Vinnumálaráðið.

Nú er Ognarfelagið LÍV sum nevnt farið eitt stig víðari, og heitir beinleiðis á løgmann um at taka um endan.